UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 3
100 Tórshavn

Dagfesting: **15. februar 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-122**

Svar

upp á

§ 52a fyrispurning nr. 52-078/2021 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinnu. Fyrispurningur um matvøruútbúgving, settur Jenisi av Rana, landsstýrismanni við uttanríkis- og mentamálum (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógvir kokkalærlingar verða í dag sendir til Danmarkar í skúla?
2. Hvussu nógv kostar hetta landskassanum og vinnuni árliga?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at útvega játtan til, at verandi kokkaútbúgving á Tekniska Skúla í Klaksvík kann uppstigast, soleiðis at til ber at taka alla útbúgvingina í Føroyum?
4. Um landsstýrismaðurin ætlar at hækka játtanina, nær kunnu vit so vænta, at hetta verður gjørt?

Svar

Til 1: Allir kokkalærlingar í Føroyum fara í dag til Danmarkar at ganga í skúla. Møguleiki er at taka 1. og 2. skúlaskeið á Tekniska skúla í Klaksvík, men so at siga allir taka øll skúlaskeiðini í Danmark. 10 lærusáttmálar vóru undirskrivaðir í 2020, og hetta samsvarar við miðaltalið av lærusáttmálum á økinum seinastu 10 árini. Flest lærusáttmálar vórðu undirskrivaðir í 2014 og 2018, tá 15 lærusáttmálar vórðu undirskrivaðir.

Til 2: Eitt læruplass fær kr. 2.600 í ferðaendurgjaldi fyri hvørt skúlaskeið, sum tað sendir ein lærling á skúla í Danmark. Nakrir lærlingar taka okkurt av skúlaskeiðunum í Føroyum, og restina á donskum skúla. Er talan um lærling, ið tekur øll 4 skúlaskeiðini í Danmark, er kostnaðurin tilsamans kr. 10.400 pr. lærling. Tekur lærlingur part av skúlaskeiðunum á føroyskum skúla, verður samlaða ferðaendurgjaldið nakað minni.

Lønarendurgjaldið er tað sama, líka mikið um lærlingar ganga í føroyskum ella í donskum skúla. Í sambandi við útreiðslur hjá vinnuni er talan um avtalu millum arbeiðgevarar og arbeiðstakarar, og Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur ikki tøl fyri kostnaðin hjá vinnuni.

Til 3: Tá nýggju hølini vóru bygt og innrættað til matvøruútbúgvingina í 2016, var endamálið, at skúlagongdin í sambandi við matvøruútbúgvingarnar, gastronom/kokk og kost-&føðslu, skuldu kunna takast í Føroyum. 1. og 2. Skúlaskeið, og útbúgvingarnar gastronomhjálpari og føðsluhjálpari hava verið á skúlanum síðan. Karmarnir eru sostatt til staðar, og kostnaðurin av at bjóða fleiri skúlaskeið er avmarkaður til fleiri undirvísingartímar og tilfar.

Nøktandi lærlingagrundarlag hevur tó ikki verið fyri fleiri skúlaskeiðum. Við vaksandi matstovuvirksemi og áhuga fyri mati og matmentan sum heild í Føroyum, er møguligt, at grundarlag verður fyri fleiri skúlaskeiðum í framtíðini. Harumframt hevur Yrksidepilin nú tikið stig til at fara undir at lýsa, hvørjar avbjóðingar vinnan heldur eru við verandi útbúgving, og um møguligar tillagingar skulu gerast.

Vísir tað seg, at grundarlag er fyri at uppstiga verandi útbúgving á Tekniska skúla í Klaksvík, soleiðis at til ber at taka alla útbúgvingina í Føroyum, er hetta nakað eg vil viðgera við vælvild.

Til 4: Vísir tað seg, at grundarlag er fyri at uppstiga verandi kokkaútbúgving á Tekniska skúla í Klaksvík verður støða tikin til eina møguliga hækkan av játtanini í sambandi við viðgerð av komandi fíggjarlóg.

Vinarliga

Uttanríkis- og mentamálaráðið

Jenis av Rana
landsstýrismaður